## DAGSINS MEINING

# Her ruggar ikki rætt

Hesar seinastu dagarnar hava vit hoyrt um nakrar sera løgnar útmeldingar frá Fíggjarnevndini í sambandi við fíggjarlóg fyri 2004. Hesar útmeldingar boða ikki frá góðum, tá hugsað verður um, at týðandi stovnar í samfelagnum bráddliga verða skornir inn at beini – uttan mun til avleiðingar. Her er talan um skerjingar uttan mál og mið, reint kliniskar, kaldar og kyniskar skerjingar, sum als ikki taka hædd fyri ætlan, vilja og anda í tí skjali, ið samgongan hevur sett út í kortið ella tí tilgongd og menning, ið er í gongd í samfelagnum.

Vit hava hoyrt um stórar skerjingar á sjúkrahúsøkinum. Vit hoyra, at einasti lærdi háskúlin er tikin á bóli og verður steðgaður í síni náttúrligu og spennandi menning. Vit hoyra, at Menningarstovan, ið trúliga hevur gingið á odda at síggja nýggjar møguleikar og harvið stuðla undir at skapa samfelagnum nýggj virði og øktan útflutning, skal skerjast munandi. Vit hoyra um eina frammanundan skerda Oljufyrisiting, sum nú – eftir at samgongan og landsstýrið hava boðað umheiminum frá, at leiting og orkuspurningar eru raðfestir høgt – skal skerjast uppaftur meira. Og soleiðis kundi tú hildið fram.

Vit eru als ikki ímóti, at tað verða framdar sparingar, men at Fíggjarnevndin nú við fyrrv. løgmanni og fíggjarmálaráðharra á odda, nær sagt taka teppið undan nýggja landsstýrinum er ovboðið.

Hví skal Menningarstovan skerjast, hví skal Oljufyrisiting niður í knøðini, hví skal Fróðskaparsetrið stingast í ryggin, júst um somu tíð, sum hetta landsstýrið og henda samgonga hava lovað Føroya fólki, at tað vil raðfesta vinnuna og gransking og nýggjar vinnuvegir hægri! Tað man vera ein gáta ikki bert fyri tey góðu fólk, sum manna hesar stovnar men eisini tey mongu, ið hava sett sítt álit til, at hetta landsstýrið fór at halda síni lyfti og liva upp til sínar hugsjónir um at gera íløgur í eina langtíðarsiktaða menning ikki minst innan vinnulív, hægri útbúgving og gransking.

Tí eru ætlaðu skerjingarnar á Menningarstovuni, Oljufyrisitingini og Fróðskaparsetrinum, burturvið og verða tær framdar, eru tær ein fallitterklering til landsstýrið og samgonguna á tingi. Hvussu ber tað til, at formaðurin í Fíggjarnevndini, tykist at kúvenda og tekur saman hendur við teimum – sum vit vita sum andstøða náttúrliga vilja royna at seta kílar millum samgonguflokkarnar. Føroya fólk hevur krav uppá at fáa at vita, hvør orsøkin er og hví formaðurin í Fíggjarnevndini heldur enn at tryggja sær, at lyftini í samgonguskjalinum verða sett út í lívið, skapar totalan forvirring og mistreysti og í veruleikanum skapar split millum landsstýrismenn og teirra bakland á tingi. Harfyri er ikki sagt, at tingmenn ikki skulu hava aðrar meiningar og metingar enn valdu landsstýrisumboðini, men kann Fíggjarnevndinin skalta og valta sum hon vil uttan at síggja til, at politikkurin, sum meirilutin í somu nevnd hevur valt, verður gjøgnumførdur, so hava vit einki minni enn politiskt kaos., og tað var nettupp tað, sum eitt nú annars skilagóði núverandi formaður í Fíggjarnevndini vildi sleppa burtur úr. Tí spyrja vit: hvat er orsøkin til, at Fíggjarnevndin lokar seg inni í eini dreymaverð og við knívi í hond tykist geva tí ætlaða politikkinum hjá samgonguni mønusting!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hetta er okkara land

**Súsanna Holm**



Eg eigi eina 83 ára gamla mammu, sum síðani hon var 18 ár hevur búð í Tórshavnar Kommunu. Hon hevur verið ein góður borgari ongantíð ligið nøkrum til last. Treyðugt vildi hon taka ímóti heimahjálp, tá ið hon fyri umleið 5 árum síðani gjørdist sjónligari veikari og staðfest varð at hon hevði Parkinson. Síðani hevur hon verið brúkari í heimarøktini, hjálpin varð so líðandi økt sum sjúkan beit fastari og fastari á, tó oftani ikki fyrr enn man talaði at, vísti á og argumenteraði fyri hesum.

Alt hetta gekk til miðan januar í ár, tá ið mamma mín datt heima í køkini. Orsøkin var, metti man smáar heilabløðingar. Hon var innløgd á Landssjúkahúsið, kom í viðgerð og tey royndu eisini við upptrening. Men mamma mín var broytt og vorðin so pleygukrevjandi at møguleikarnir fyri at hon kundi koma heim aftur vóru ikki til staðar. Sum einasta dóttur í býr í Føroyum, einkja og við børnum í skúlaaldri og undir útbúgving havi eg úr at gera við at klára dagin og vegin.

Vit fóru beinanvegin í hernað við at royna at fáa eitt røktarheimspláss. Mamma mín varð uppskrivað fyri nøkrum árum síðani til Ellisheimið. Men her var sagt at nú í sjúklingurin ikki var mobilur longur, ja so var hon ikki kanditatur til eitt pláss har.. Á Láargarði var mamma blivin uppskrivað seinni og hon var eisini komin uppá akuttlistan beint áðrenn jól 2003.

Deildin á Landssjúkrahúsinum royndi alt sum tey vóru ment at pressa á, eg sjálv havi leypandi verið í samband við Lágargarð og víst á støðuna og roynt at argumentera, fái altíð forstáilsi men eg komi ikki longur. Eg havi verið og tosað vil leiðandi sosialráðgevara í Tórshavnar Kommunu, fyri at fáa mammu mína upp á akuttlistan og aftur nú, fyri at kunna um støðuna enni aftaná fallið í januar. Eisini her møti eg forstáilsi, men onga hjálp.

Alla staðni verður sagt hevur tú roynt at ringt til Sandoyar til Vágarnar, royn tað........ og síðani turka tey sínar hendur uppí eitt handklæði og tú stendur sum avvarðandi einsamallur eftir við ábyrgdini at fylgja uppgávuni upp.

Samstundis gjørdust støðan meira og meira trupul, mamma mín var ikki nakar lættur sjúklingur á eini meddicinskari deild, har í álvarsama sjúkir sjúklingar koma og fara og ofta liva sína síðstu tíð. At enda var eg biðin at koma til eina samtalu, har í eg fekk at vita, at klagur vóru komnar orsakað av hennara ófrið og rópan. Orsakað av hesum og orsakað av at mamma mín ikki hevði útlit til at fáa eitt røktarheimspláss í bræði, var tann avgerð tikin at mamma mátti doyvast niður so hon ikki longur var til ampa fyri hinar sjúklingarnar.

Enn eina ferð royndi deildin at tosa við Tórshavnar Kommunu og eg sjálv fór enn eina ferð at tosa við Lágargarð og Sosialu Deild og segði teimum frá hesi ólukkuligu støðu, men uttan úrslit.

Í neyð míni setti eg meg í samband við Landsstýrismannin í Almannamálum kunnaði hann um støðuna. Hann royndi at fáa eitt av sínum embætisfólkum at hyggja uppá sakina, men í skrivandi stund eru vit ikki komin nærri einum úrsliti.

Síðani leygardagin 1. mai havi eg ikki verið í kontakt við mammu mína. Hon liggur í eini song, verður tikin upp í bað um morgunin, fær at eta men síðani doyvd niður. At henda viðgerð skjótt fer at geva álvarsamar fylgir fyri likam og sál havi eg fingið at vita. Men nú er hon ikki til ampa fyri eina flugu.

Eg má sum borgari í hesum landi og sum menniskja tala at hesi framferð móti einum menniskja. Hetta er at taka ræðið av einum menniskja ið hevur verið ført fyri at tala sína egnu søk. Hetta er átaluvert og skammiligt at slíkt skal fara fram í einum demokratiskt kristnum samfelagið. Eg kann ikki lasta nøkrum stovni ella nøkrum starvsfólki, tí øll hava gjørt ta ið tey vóru ment og innan fyri tær rammur ið vóru teimum álagdar av landsins myndugleikum.

Eftir stendur at hetta er ein politiskur spurningur, her er talan um eitt menniskja ið ikki er pláss fyri í okkara samfelagi og sum tískil má beinast til at tiga og verða friðarligt. Tá ið hetta kann bera til í okkara demokratiskt kristna samfelagið, er tað mín meting at ikki er langt til at vit gloypa tí bita, sum gevur loyvi til at taka lívið frá fólki ið eru óynskt, besverlig, ið ikki passa inn í tær av okkara politikarum skipaðu rammum.

Eg veit hvat í mamma mín ynskir, hon ynskir at sleppa heim, men skilir at tað ber ikki til og at hon má fáa hjálp til næstan alt. Eg fái tað argument frá Tórshavnar Kommunu at so nógv onnur eru í somu tøðu sum vit - eg má spyrja um man metir at tað legimentarar trupulleikan at so nógv onnur miðalaldrandi fólk í bæði arbeiða, hava børn heima og í útbúgving, fyriuttan ommubørn, eisini skulu passa teirra gomlu foreldur í áravís. Hevur nærkar hugsa um hvussu tey gomlu hava tað við at verða uppá skift hjá sínum børnum - hevur nakar politikari mett at tað var neyðugt við einum eldraráðið í fekst við annað enn bingo og at skipa fyri útferðum?

Eftir stendur at vit hava eitt samfelag ið als ikki virðir síni gomlu. Vit hoyra ferð aftaná ferð politikarar argumentera fyri at fleiri og fleiri og fleiri eldri verða, tvs. at tey verða ein størri og størri útreiðsla fyri samfelagið. Eg spyrji hvussu nógv prosent av árganginum frá 1904 og niðureftir liva enn? Hevur okkara samfelag ikki ráð til at geva hesum aftaná at tey hava búð sum longst heima og gerast sjúk og veik eitt virðiligt lívskvøld? Vilja tit sum sita í Løgtinginum flytast uppá skift millum tykkara børn tí onki pláss er fyri tykkum?

At eitt gamalt hampafólk, ið dettur um í køkini hjá sær sjálvum skal enda sum eitt fløskuhálsproblem, niðurdoyvt so at tað ikki er til ampa fyri samfelagið má eg sum dóttur og ikki minst menniskja tala at.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# ES – Fyrimunir og vansar

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*
*Tórshavn 12.05.2004*



Tað hevur verið við ávísum millumbilum tosað aftur og fram um fyrimunir og vansar við ES og møguligum framtíðar limaskapi fyri Føroyar og í hvørjum líki hesin so kemur at verða.

Tær kanningar sum gjørdar eru hvørt vit vilja verða partur av hesum felagskapi ella ikki, hvat víst at meirilutin av føroyingum ikki ynskir limaskap í ES - í hvussu so er ikki enn.

Kundi hugsað mær, at ein av orsøkunum til at flestu føringar siga nei, ivaleyst er grundað á manglandi vitan um ES og so tann ræðumyndin, sum verður sett fram, at vit verða nærmast etnir av hesum øgiliga bureaukratii og fáa lítla og onga ávirkan framhaldandi á okkara heimligu viðurskifti, tað verið seg tey politisku, fíggjarligu, vinnuligu og sosialu.

Hin, og ivaleyst tann størta orsøkin er, at okkara fiskivinnupolitikkur als ikki er í trá við ES fiskivinnupolitikkin, men tað sær út til, at fleiri ES lond m.a. Bretland og Danmark eru við fáa eyguni upp fyri hesum alt vaksandi trupulleika fyri teirra fiskivinnu bæði á sjógvi og landið og koma at krevja broytingar, eins og Noreg og Ísland, um tey skulu gerast limir koma at seta krøv hesum viðvíkjandi um tey skulu innimast í samveldið.

### Okkara útflutningur - hvar fer hann?

Stórt sæð allur okkara útflutningur - 95% av fiskavørum fer til ES - tvs. ES er okkara størsti avtakaramarknaður og er harvið eisini við til at ávirka okkara samfelag meir enn vit dagliga geva okum far um.

Við teimum londum sum nú eru løgd afturat ES samveldinum so eru uml. 500 milliónir ES borgarar - vit eru 48000 borgarar í Føroyum og áttu tíkil at kunna livað sera væl av at gagnnýtt hendan marknað um rætt verður fram farið.

### ES- veterinærlóggávan galdandi í Føroyum

ES veterinærlóggávan hevur verið galdandi í Føroyum síðan febr. 2001 og ger hendan tað, at føroyskir fiskaúrdráttir tá teir eru farnir um góðkenda landingarstøð eru at kalla í ES heimamarknaðinum.

Sama ger seg galdandi við 3. lands vørum, sum tá tær hava verið yvir sokallaða BIP støð eisini eru at betrakta sum verðandi í ES.

Ein kann so tosa við og ímóti, um hendan avtalan er tann besta fyri okum ella ikki - tað veldst um eygað, ið sær.

Vit kunnu ikki renna undan veruleikanum, tað hava vit sæð hesar seinastu dagarnar viðvíkjandi okkara útlfutningi av laksi, har ES ætlar at áleggja revsitoll í 200 dagar – vit eru smáir og sera sárbærir.

Fortreytirnar í samvinnu okkara við útheimin broytast støðugt, og tær stóru búskaparligu og handilspolitisku broytingarnar í londunum rundanum okkum seta føroyskum vinnulívi nýggjar og størri avbjóðingar

Hendan gongin er partvís eitt úrslit av, at samansjóðingin i ES er víðkað, til at fevna um fleiri samfelagsøki og lond, tey fyrstu 10 londini av 25 komandi ES limalondum, eru just nú 1 mai løgd afturat

Tey lond sum ikki eru limir í ES hava fingið serligar avtalur, sum knýta tey nærri at samansjóðingini í ES.

T.d. londini í Mið og Eysturevropa hava inntil tey gerast limir gjørt samvinnuavtalur, sum bera í sær at tey koma nærri ES búskaparliga og politiskt.

Hesar avtalur er sum oftast eitt stig fram á vegnum móti ES innliman.

### Noreg og Ísland - EBS avtalu við ES

Noreg og Íslands hava t.d. við teirra EBS (Evropeiska Búskaparliga Samstarvið) avtalu fingið nógv tættari samvinnu við ES á nógvun týðandi økjum og væntast kann, at báðir hesir grannar okra verða limir í ES innan heilt fá ár - ivaleyst 2-3 ár frá nú.

Okur hoyrdi fyri kortum, at Noreg nú umhugsar at lata vinnulivið í ES fáa loyvið at eiga upp til 49% av kapitalinum í fiskiskipum, hetta fyri m.a. framhaldandi at hava góð viðurskifti við ES - tó uttan at verða limir.

### Hvar eru Føroyar staddar í hesum høpi?

Føroyar hava valt at verða uttan fyri meginrákið í Evropeiska samstarvinum.

Vit eru ikki við hvørki í ES, EFTA ella EBS.

Okkara viðurskifti við ES eru í staðin skipað í eini handilsavtalu og eini fiskiveiðuavtalu.

Fyri onnur øki eru ongar avtalur millum Føroyar og ES.

Av hesum eru vit blivnir eftirbátur í handilspolitisku samansjóðingini í Evropa.

Tann handilsavtalan, sum vit hava í løtuni, hevur alt ov trongar karmar viðiv samskifti við ES og møguleikarnir fyri gagniligari marknaðartilgongd í galdandi avtalu eru avmarkaðir og ivaleyst fulltroyttir og hon kemur ikki í longdini at nøkta tørvin hjá vinnuni.

Tað er tó at gleðast um, at PAN Europeiska avtalan væntandi verður góðkend av ES og kemur at virka frá 1 januar 2005.

### Marknaðaratgongdin í framtíðini alt avgerandi fyri vinnulívð

Tað at ynskja sær gagnligastu marknaðaratgongd til ES, uttan at hetta ber í sær grundleggjandi broytingar í viðurskiftum okkra við ES, - minnir ikki sørt um tá Jacob Haugaard á sinni lovaði veljarum sínum undanvind á súkklubreytunum

Ein frí marknaðartilgongd, har ongar toll-og ella tekniskar forðingar eru, er neyðug fyri kappingarføri okra á ES marknaðinum.

Tað er neyðugt at gera ser greitt, at skal gagnligasta marknaðartilgongdin gerast veruleiki, er neyðugt við ørðum samstarvsshátti, sum er víðfevndari enn galdandi handilsavtala.

Við vunnum rættindum mugu vit eisini átaka okkum skyldur, litið er at ivast í tí.

Hjá einum samfelag, har størstiparturin av framleiðsluni verður útfluttur er sera umráðandi av samvinnan fevnur um annað enn marknaðarsømdir í keyparalondunum.

Kappingarføri snýr seg eisini um, hvussu vit eru við í ørðum altjóða samstarvið, eitt nú um arbeiðsmarknað, tænastur, samskifti, útbúgving, gransking, heilsufrøðislig viðurskifti, útbúgving osv.

Hetta hevur eisini alstóran týdning fyri teir karmar vinnulívið virkar innanfyri.

Vit eru eisini greið yvir, at tað eru samstarvsformar sum geva gagnligari marknaðaratgongd fyri smátjóðir/lond bæði sjálvstøðug og tey sum eru knýtt at einum limalandi við ávísum sjálvstýrisheimildum.

Hesi lond hava vanliga fingið serskipanir ella undantøk í limaskapinum hjá høvuðslandinum.

Tann nevndin sum gjørdi tað sokallaða Bláa Álitið kom til ta niðurstøðu, at fortreytirnar fyri tey lond, sum høvdu hesar avtalur og Føroyar vóru so ymiskar tí teir búskaparligu og ríkisrættarligu fyritreytirnar vóru so ymiskar.

### Dialogur og samráðingar eru vegurin fram

Dialogur og samráðingar eru vegurin fram fyri at fáa eina góða avtalu við ES, men vit mugu heldur ikki verða so bláoygd at halda, at vit kunnu lata eyguni aftur fyri umheiminum og liva sum um verðin stendur í stað og onki gera við okkara støðu, tí eitt er púra greitt - skulu vit gera okum nakra vón at at virka saman við ES í kapping við Noreg og Ísland, sum ídag hava væl betri avtalur enn vit, so mugu vit takað annað skinn um bak og tað skjótt.

### Limaskapur - ella hvat er alternativið?

Skulu vit, sum tað ultimativa taka stigið til ES limaskap gjøgnum Ríkisfelagsskapin í eini avtalu eftir td. »Álendskum leisti«, har vit stremba eftir at hava fullan ræðisrætt framhaldandi yvir okkara fiskatilfeingi og kanska eisini einari komandi oljuvinnu - ella skulu vit framhaldandi royna at hava sokallaða assosieraða avtalu við ES, har vit royna at fáa sum frægast burturúr, men har okur vita, at tað altíð verður tað næst ella triðfrægasta vit fáa burturúr - valið verður kanska í seinasta enda als ikki okkara, men kunnu vit vænta at verða drigin eftir reyv inn í ES um Noreg og Ísland velja at gerast limir.

Í ES samveldinum koma vørur og tænastur at flóta ótarnað tvørturum landamørk uttan forðingar av nøkrum slag fyri limalondini.

Rætt til lesnað arbeiði og sosialar o.a. tænastur hava øll somuleiðis.

Tað verður eisini givin bæði hollur fíggjarligur stuðul og ráðgeving til átøk/verkætlanir, sum verða mettar at hava vinnuframa við sær eins og mentan, list, gransking o.a. verður høgt prioriterað.

### Ráðstevnan um breiða kunning um ES - fyrimunir og vansar

Sambandsflokkurin legði í 2003 uppskot fyri løgtingið um at skipa fyri ráðstevnu um fyrimunir og vansar í samstarvinum við ES, men hetta uppskot bleiv felt av tásitandi samgongu.

Tí er tað gleðiligt at Høgni Hoydal og eisini vinnan sjálv nú tá trupulleikarnir stinga seg upp, vakna og vilja hava kjak og kunning um ES og okkara framtíðarsamskifti við ES samveldið.

Lat okkum seta okkum sum mál at fáa hesa ráðstevnu skjótast tilber.

# Havnar kommuna og Hans P Strøm: Vit búgva ikki í Rumeniu

**Jón Ellendersen**



Siti her við einum máli, sum snýr seg um ein smádrong, sum er vorðin kastibløka hjá Tórshavnar kommunu, eins og lítli Petur er vorðin.

Pápi dreingin, sum er kendur fyri at nýta harðskap bæði móti børnunum, mammuni at dronginum og hevur dóm fyri harðskap, samstundis sum hann hevur fingið fleiri ávaringar, er vorðin hetja og hin stóra stjørnan hjá Tórshavnar kommunu og Barnaverndarnevndini.

Tað løgna, og tragiska í málinum er, at kommunan bert hevur lurtað eftir pápanum og yvirhøvur ikki givið mammuni ella foreldrum hennara gætur. Pápin fær tað sum hann vil hava.

Men, at drongurin í fleiri ár hevur vantrivist, er sálarliga illa fyri og helst vil vera hjá mammuni og ommuni, hevur ongan áhuga hjá Tórshavnar kommunu. Væl vitandi, at sosiala umhvørvið, drongurin livir í, er beinleiðis hóttandi fyri uppvøksturin, hevur kommunan lurtað eftir lygisøgur hjá pápanum um, at tað er hjá mammuni, at sosiala umhvørvið er "konfliktkent" – hóast kommunan ongantíð hevur gjørt sær ómak at eftirkanna, um so er.

Nú vita tey flestu, sum kenna heimi hjá mammuni og ommuni, at har eru ikki fleiri konfliktir enn í flest øðrum heimum, tvs. heilt vanligt. Tey vita eisini, at drongurin hvørja ferð hann er hjá mammuni og ommuni, bønar og biðir um at sleppa at vera har. Hann vil ikki heim aftur til pápan.

Men okkara kæri landsstýrismaður, Strømmurin hevur, sum tað ljóðar úr Tinginum, lagt linjuna: Um alt er farið rætt fram umsitingarliga, so er alt í lagið. So vertin á, at lívið, bæði hjá Peturi og dronginum, er her sigi frá, verður lagt í skeljasor'.

Vóru vit stødd í Irak, Rumeniu ella í Týskalandi undir 2. heimsbardaga, var tað skiljandi. Men at tílík mannminkandi framferð gongur fyri seg í einum landi, sum kallar seg demokratiskt og reypar av, at vit fylgja mannarættindarboðunum hjá ST, er einki annað enn ein ræðusøga.

Vit kunnu bara, øll sum ein, gera okkum tað niðurstøðu, at:

– Tórshavnar kommuna hugsar meiri um mannagongdir og rættin hjá starvsfólkinum, enn hon hugsar um lívið hjá teimum børnum, sum eru borgarar í kommununi.

– Hans Pauli Strøm er ikki verdugur at sita sum landsins hægsti myndugleiki í almennamálum, tí hann hevur lítlan og ongan áhuga í teimum, hann er settur at vera tænari hjá: børnunum, teimum veiku og brekaðu. Tað er ringt at ímynda sær, at hann skal vera javnaðarmaður og ikki úr Dansk Folkeparti.

– Bæði kommunan og landsstýrismaðurin uppføra seg sum tænastumenn í teimum nú falnu eysturevropeisku diktaturunum.

Og neyvan er seinasta orðið sagt í hesum málum.

Gud vitið um ikki fleiri mál av hesum slag fara at koma fram í ljósmála?

Í øllum føri, fari eg at takka SvF fyri, at tey so trúgv hava fylgt málinum um Petur og ikki lata seg noyða við, at Hans Pauli Strøm gevur okkum ein slutur fyri ein slatur.